VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

- Øll mentan hevur eina rúmliga dimensjón. Mentanin verður styrkt tess meiri tilvitað vit gerast um umhvørvið í býnum. Takið býarumhvørvið meira við í kjakið um mentan og hjálpið Havnini at finna seg sjálva

Hildur Eyðunsdóttir, forkvinna í mentanarnevnd Tórshavnar Býráðs

Eitt humanitert framstig

Um vikuskiftið varð fráboðað, at Filippinurnar hava avtikið deyðarevsingina. Hetta eru av sonnum stór tíðindi hjá teimum mongu, sum stríðast fyri avtøku av hesi barbarisku revsing. Filippinurnar hava nýtt deyðarevsingina rættiliga nógv og hava tí ligið ovarlaga í tí skeiva endanum av hagtølunum yvir deyðarevsing. Her hevur landið verið í bólki við Kina, Iran og USA, sum eru á odda í hesum syndarligu hagtølum. Tað eru júst í ár liðin 300 ár síðan seinasta avrættingin fór fram í Føroyum og vit í roynd og veru tóku av deyðarevsing. Hetta sigur nakað um søguliga perspektivið!

Allir mannarættindafelagsskapir eru ímóti deyðarevsing. Teir vísa á, at henda revsing er klárt í mótstríð við tey menniskjansligu, etisku og átrúnaðarligu virði, sum eyðkenna eina framkomna nútímans siðmenning. Deyðarevsing er endalig bæði á ein og annan hátt. Vandin fyri mistøkum er sera stórur og er tá eingin møguleiki at broyta ella gera ein órætt um. Søgan, t.d. eftir annan heimsbardaga, hevur avdúkað ein hóp av mistøkum í Bretlandi og USA, har ósek eru vorðin avrættað. Hvussu er so ikki vorðið, har rættarskipanin er minni framkomin enn í hesum londum?

Øll humanitert hugsandi fólk eiga at fegnast um avgerðina hjá Filippinunum. Henda avgerð er eitt stórt humanitert framstig. Henda avgerð er við til at økja um mótið og stríðsviljan hjá humaniterum og átrúnaðarligum bólkum og felagsskapum, sum kring allan heim virka fyri avtøku av deyðarevsing. Henda avgerð hjá Filippinunum kann tykjast lítisverd, tá hugsað verður um, at nógv lond framvegis nýta deyðarevsingina. Men soleiðis eigur ein ikki at hugsa. Fyri hvørja ferð eitt land legst afturat tí fjøld av siðmentum tjóðum, ið ikki nýta hesa ræðuligu og ómenniskjansligu revsing, flytir heimurin seg eitt stig longur fram, sæð frá einum humaniterum sjónarmiði.

Sosialurin

Nakrir spurningar í samband við tíðindaskrivið frá Róðrarsambandinum

KÁRI P. HØJGAARD
Løgtingsmaður



1. Hví hevði Róðrarsamband Føroya fund saman við start- og høvuðsdómarunum eftir eystanstevnukappróðurin ?

2. Varð góða veðrið orsøk til, at startdómarin fyri skjótari at kunna avgreiða startin, brúkti øðrvísi framferðarhátt enn vanligt, so slakki var varð á endanum ?

3. Varð ein triði bátur ávaraður, annars hevði helvtin av 10 mannaførunum ligið fastir í startinum?

4. Bleiv á fundinum staðfest, um manningin á Eysturoyingi og Vestmenningi høvdu skyldina av óhappinum, ella var talan um ein tekniskan feil?

5. Var avgerðin í tíðindaskrivinum, sum Hans David Hansen kappingarleiðari hevur undirritað, einmælt ?

Í vikuni verður broyting gjørd í reglunum sum sigur: Skotið verður av, um bátur hongur. Fyri hetta fær hann gult kort. Tó verður onki kort givið, um tekniskur feilur kann ávísast.

Tað er ein undanførðsla av nevndini í Róðrarsambandinum at staðfesta, at rætt varð farið fram av start og høvuðsdómara og at onki kann gerast við hetta málið, tí ongin hevur kært. Tit sum valdir eru at hava ábyrgdina av kappróðrinum, og at úrslitið er so rættvíst sum gjørligt; tit hava skyldu at taka málið upp av eintingum, um tit meta, at úrslitini í FM-kappingini hjá fleiri av luttakandi bátunum kundi verið øðrvísi, um bátarnir ikki hingu fastir umframt avleiddu ávirkanini, at onkur bátur av hesi orsøk ætlaði at leggja árarnar inn.

Mín áheitan á Róðrarsambandið, skal verða. Lati kappróðurin á Eystanstevnu verða ein steyparóður, ið ikki telur við í samlaðu FM- kappingini í ár. Hetta er eisini áheitanin frá flestu av luttakandi 10 mannaførunum.

Við ítróttarkveðu

Vóru tað ordrar frá venjaranum??

JOHN SIGURD JOENSEN

Síðsta mikukvøld kom HB á vitjan hjá KÍ í Formuladeildini. Dystirnar millum hesi feløg plaga at vera góðir og væl leiktir. HB byrjaði dystin best, fingu brotsspark, men vælleikandi Meinhard bjargaði, men løtan bleiv stokkut, tí bert løtu seinni hevði HB skorað til 0-1. Meinhard var møguleiga heldur skjótur út úr málinum, men so kom ferð á KÍ spælið, áðrenn nakar varnaðist var KÍ frammanfyri 3-1. Farið varð eisini til hálvleik við hesi støðu, 3-1, til KÍ. Sigast skal, at málini sum KÍ fekk vóru sera góð og væl gjøgnumsæld. Hvat venjarin Tony Paris hevur sagt við leikararnar í hálvleikinum er ikki gott at vita, men eg haldi, at tá seinni hálvleikur byrjaði, sá ein hvat ætlanin hjá KÍ var, athalda leiðsluna og spæla verjuspæl í samfullar 45 minuttir. um hetta var taktikkurin hjá venjaranum var hann hol í høvdið. KÍ hevði jú ein super fyrra hálveik, eftir mínum tykki var eingin grun til nakra spælbroyting í seinna hálvleiki, møguleiga vóru KÍ'ararnir trýstir aftur av einum vælleikandi HB-liði, men eitt veit eg, at KÍ liðið var ógvuliga tamt í seinna hálvleiki av tí sama, at KÍ flutti fólkið longur aftur, farligari blivu HB'ararnir.

Tá umleið 10 minuttir eru eftir fær HB eitt fantastiska flott mál, bólturinrakar sjálva stongina heilt uppi við tvørtræið og brestur í KÍ-málið. Meinhard kundi bert hyggja, eitt sera flott mál. Nú knappliga er støðan 3-2, og tað vísti seg at KÍ-ararnir høvdu einki aftursvar. Verjuspælið hevði gjørt leikararnar dovnar.

KÍ hevði tó enn 3 stig í posanum, men so hendur tað, sum aldrin skal henda, ein HB'ari blívur feldur beint uttan fyri brotsteigin hjá KÍ, bert lítil tíð er eftir at leika. Har hjálpti eingin manngarður, BB'arin dundraði bóltin undir tvørtræið og í málið, eitt sera flott mál, støaðn 3-3.

Um tað er venjarin hjá KÍ, sum í hálvleikinum hevur lagt hendan verjutaktikk, kann eg bert siga, var tað ein taktikkur, sum kostaði KÍ tvey stig. Til endans kann eg siga, at elsti maður hjá KÍ var besti maður hjá KÍ-liðnum hendan dagin.

Innsent tilfar

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Redaktiónssekreterur:
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

Uppseting/prent:
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.